# LÆRLINGAR TIL DAMOR

**Virksemi okkara er í vøkstri og tí sóknast vit eftir tveimum lærlingum - einum til handilin og einum til goymsluna**

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi og lættur av lyndi, ikki bangin fyri at taka eina hond í har á stendur og kann arbeiða sjálvstøðugt.

Sum lærlingur hjá Damor fært tú beinanvegin tillutað títt ábyrgdarøki.

Vit bjóða tær eitt starv í einum spennandi og mennandi umhvørvi, har góður samstarvsandi valdar millum starvsfólkini.

Útbúgvingin fer fram í handli okkara á Hjalla og við skúlagongd í Danmark.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 15. februar 2006

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor

# Sandoyar Barnaverndartænasta

Við hesum verður søkt eftir leiðara til Sandoyar Barnaverndartænastu, sum umfatar kommunurnar í Sandoynni og Skúvoyar kommunu.

Starvið, ið er hálvtíðarstarv, verður at seta so skjótt sum gjørligt, eftir at umsóknarfreistin er úti - ella so skjótt sum tilber eftir uppsagnarfreist í einum verandi starvi.

Starvið krevur eina hóskandi, miðallanga útbúgving. Um umsøkjarin harumframt hevur royndir innan barnaverndarøkið, er tað ein fyrimunur.

Skrivstovan hjá Barnaverndartænastuni verður í Húsavík.

Starvið verður lønt eftir sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og freistin at søkja er úti 11. februar 2006.

Umsóknirnar skulu stílast til:

**Sandoyar Barnaverndartænastu**
v/ Hanusi undir Leitinum
230 Húsavík

# RØRSMIÐUR ELLA HANDVERKARI

Søkt verður eftir rørsmiðjum ella handverkarum at byrja skjótast gjørligt.
Vit vænta at tú arbeiðir skjótt og væl, ert álítandi og førur at arbeiða sjálvstøðugt.
Umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. verða at senda til:

Rør-tænastan
Postsmoga 1106
FO-110 Tórshavn



Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðfinn Hansen á tel 22 81 80

rør-tænastan
Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión

# GLASTREVJABÁTUR TIL SØLU



35 fót glastrevjabáturin, Huldusteinur til sølu við fiskiloyvi, um hóskandi boð fæst. Báturin varð longdur fyri einum ári síðani, og er í sera góðum standi. Motorurin er ein 4 ára gamal Solé, 155 HK. Báturin er sera væl útgjørdur við allari vanligari nautiskari útgerð umframt línum, snellum og aðrari útgerð.

**Nærri fæst at vita við at ringja á: tlf. 773302 ella 269616**



**Hesin NISSAN NAVARA er til sølu. Hann er 2 ára gamal, og koyrt 18000 km. Ring og hoyr nærri á 227635 ella 456935**

# Umboðsmannaval

Samb. grein 28 í høvuðssamtyktini verður val av umboðum til sjúkrakassan.

Veljast skulu eitt umboð fyri Sand og 2 fyri Skopun.

Uppskot skulu skrivliga vera sjúkrakassanum í hendi áðrenn 24. februar.

**Sandoyar Sjúkrakassi**
**210 Sandur**

# Gravarhjálp

*Marknagilsvegur 86 · 100 Tórshavn*
*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*herman@post.olivant.fo*

**Vit útinna allar uppgávur í sambandi við eina jarðarferð frá byrjan til enda**

- Eisini sangir, blómur og kransar
- Vit syrgja fyri sangarum *(í Tórshavn)*
- Vit framleiða okkara egnu kistur *(veita um alt landið)*
- Skipa fyri líkflutningi til og úr Føroyum
- Skipa fyri líkbrenning
- Hjá okkum kanst tú bestemma **tín síðsta vilja**

Sosialurin 341800

# Umboðsmannaval

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini, verður lýst til val í Sandavági 27. februar 2006.

Veljast skulu 1 umboð fyri Sandavág, 1 fyri Miðvág og 1 fyri Sørvág.

Uppskot til umboð skulu skrivliga verða sjúkrakassanum í hendi í seinasta lagi 13. februar 2006.

**Vága Sjúkrakassi**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Í ÁR VERÐUR NEISTIN 75 ÁR

NEISTIN 75 ár

– og tí verður sjálvandi skipað fyri 75 ára veitslu, sum samstundis eisini er ársveitslan í ár. Veitslan verður hildin í hølunum hjá Havnar Róðrarfelag í Álakeri,
**leygarkvøldið 11. februar 2006 kl. 19.00.**

At júst hesin dagur er valdur, kemst av, at hetta er eitt av fáu vikuskiftunum í vetrarhálvuni, har hondbólturin liggur stillur. Men ikki stillari enn so, enn at hetta er dagurin, tá ið steypafinalurnar verða spældar. Sum kunnugt, hevur besta kvinnulið okkara megnað at leika seg í finaluna, og vit hita tí upp til veitsluna í høllini...

Aldursmark: Gentur/dreingir 16 ár og eldri.
Kostnaður: 18 ár og eldri: kr. 300,- – yngri enn 18 ár: kr. 250,-
Tilmelding: Fere fram við at gjalda luttøkugjaldið á konto: 6460-151.071.3 í Føroya Banka. Viðmerk navn títt á flytingina, umframt: "75 ára veitsla".

Seinni í vár verður skipað fyri 75 ára haldi fyri yngru limunum. Foreldur eru sjálvandi vælkomin í veitsluna.

Vit gleða okkum at síggja tykkum

**Nevndin og trivnaðarbólkurin**

NEISTIN